# VEÐRIÐ Í OYNDARFIRÐI



# JANUAR 2025

# VEÐURSTOVA FØROYA

**Dagfesting**: 30. januar 2025

**Staður**: Ovarivegur 21 – 690 Oyndarfjørður

**Heimildarfólk:** Sólbjørn Klein

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

# Veðrið í bygdini

Bygdin Oyndarfirði er staðsett á norðara armi á einum fjørði við sama navni.

Fjørður er opin í landnyrðing. Beint eystan fyri fjørðin eru Djúpini, og hinumegin eru fyrst Kalsoy og so næstan allar hinar Norðoyggjarnar. Hetta hevur við sær, at eysturættin er sera góð og turr í Oyndarfirði, tí at lotið skal upp um nógv og høgfjøll, áðrenn tað er á fjørðinum ella í bygdini.

Norðan- og vestanfyri eru fjøll og fjallarøð. Norðanfyri eru Oyndfjarðarfjall (421m) og Tindur (503m). Tey eru góð verja ímóti høgættini. Vestan fyri bygdina er drúgvur dalur og eitt skarð. Liggur lotið úr Skarðinum og oman ígjøgnum dalin og ímóti bygdini, tykist sum at vindurin samlast í Áardali og so er kann vera nógvur vindur nirði í bygdini.

Innan fyri bygdina í útsynning og sunnan er ein brøtt fjallarøð. Byrjandi í norðara enda er Knúkur, og so er røðin hægri inneftir. Innast er Vaðhorn (727m). Hendan røðin órógvar luftrákið av høgum útsynningi upp ímóti útnyrðingi, og tí eru ættirnar millum tær keðiligar við ójavnum vindi – og í illveðri eru tær skaðaættir.




*Mynd 1: Eysturpartur av Eysturoy. Pílarnir peika allir ímóti Oyndarfirði.*

Sunnanfyri og eystanfyri er fjørðurin – Oyndarfjørður. Hann er umleið 2½ km djúpur, og uttast er hann umleið 1½ breiður. Hinumegin fjørðin eru Hellurnar, og omanfyri bygdina er fjallarøð, har sum Slætnatindur (625m) er hægstur. Hendan røðin verjir Oyndarfjarðarbygd ímóti suðurættini og landsynningi. Tær ættirnar er góðar góðveðursættir.

Men fyri at fáa greiði á, hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Oyndarfirði, setti undirritaði seg í samband við Sólbjørn Klein. Hann er úr Oyndarfirði og hevur altíð búð har. Hann var sjómaður í ungum árum, og hevur arbeitt eitt drúgt áramál í alivinnuni á fjørðinum. Hann beyð mær til Oyndarfjarðar at vitja seg og gera samrøðu um veðrið í bygdini.

Við til samrøðuna, sum var í heiminum hjá Sólbirni á Ovaravegi 21 í Oyndarfirði hevði eg spurnarblað til 16 ættir – tær 4 høvuðsættirnar og hálvættirnar umframt tær 8 millumættirnar:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan kemur suður ígjøgnum Djúpini, kann eisini koma úr Skarðinum og er ein hampuliga góð ætt í Oyndarfirði.




Vindurin av norði er ikki so javnur. Á sumri í góðveðri er tað vanliga kalt, men viðhvørt kennist tað lýtt. Blívur høgættin gomul, verður hon sera góð. Í illveðri á vetri er nógvur vindur, men norðan er ikki skaðaætt. Vindferðin er yvirhøvur minni enn kring landið, men mest ójavnur hvirluvindur.

Er hann beinur norðan, kemur hann suður ígjøgnum Djúpini, og tá kann vera góður terri. Kemur hann eisini úr Skarðinum, er ógvuliga svikaligt við terranum. Tað kann regna illa úr Skarðinum, meðan tað er turt beint innanfyri. Fólk, sum hava arbeitt í haganum oman fyri bygdina, hava verið í oljuklæðum, meðan tey sum hava arbeitt bert eitt sindur innanfyri, hava als havt tað fyri neyðini. Ein bein strika sæst í vegnum – sum sett við linjuál – hvussu langt regnið røkkur. Regnið røkkur ikki altíð út á Hellurnar. Har hevur onkurntíð verið sól og brenniterri, meðan tað í Oyndarfirði hevur regnað úr Skarðinum.

Tá ið tað kemur til kava, er norðan ikki nøkur serlig kavaætt. Kavi legst, men ikki nógvur.

Norðan er mjørkaætt í Oyndarfirði, serliga um summarið. Á vetri er sjáldan mjørki. Er lýtt í veðrinum á høgætt, og mjørki kemur, er kuldi á veg og um veturin kavi.

Einki brim er í Oyndarfirði, tá ið hann er norðan.

Á norði, sum á flest øllum ættum, hugdu menn út í Djúpini at kanna veðrið, áðrenn teir fór avstað. Veðrið í Djúpunum er eisini veðrið á Norðhavinum, tó at hann batnar eitt sindur, longur norður tú fert.

## Landnyrðingur norðan

Tá ið ættin er landnyrðingur norðan, kemur hann suður ígjøgnum Djúpini og dettir inn á fjørðin viðhvørt.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur kemur upp fyri Kalsoynni og fer suður ígjøgnum Djúpini, undan Stongini fram við landinum inn á fjørðin.




Tað er fyri tað mesta eitt frískt lot inn á fjørðin, tá ið hann liggur av landnyrðingi. Lotið kemur undan Stongini og fer tvørtur um fjørðin. Tað heldur seg úti á fjørðinum og merkist ikki heimi í bygdini – t.e. norðan fyri Stórá. Innanfyri (*sunnan fyri Stórá*) merkist landnyrðingurin væl, og er nógvur vindur, koma glaðurnar viðhvørt niðan millum hús.

Í nógvum vindi koma stórar glaður undan Stongini, og longur inn á fjørðin tú fert, verri er veðrið, og tað kann vera sera óslætt har inni. Glaðurnar fara ikki altíð langt inn á fjørðin.

Fyri nøkrum árum síðan, tá ið tað var nógvur kavi, hevði ein maður á Hellunum fingið skipsboð og skuldi avstað. Tað var ikki koyrandi til ella frá Hellunum fyri kava, og roynt var tí at fara eftir honum við báti, men tað bar ikki til, tí eitt frískt lot var av landnyrðingi, og tað var sera óslætt við lendingina á Hellunum. Maðurin mátti fara til gongu í kavanum heim til Oyndarfjarðar og hava sletu við til klæðsekkin. Tað tók honum nakrar tímar. Ein bátur legði at í Oyndarfirði, tí har var mestsum stilli og fór avstað við manninum.

Tað bert í heilt lítlum vindi, at tað ikki er eitt frískt lot á landnyrðingi.

Viðhvørt skiftir ættin millum landnyrðing og eystan. Tá kann vera stilli í løtum, meðan hann er niðri í eystri, og so er aftur eitt frískt lot, tá ið hann er farin uppaftur í landnyrðing. Liggur hann bara av landnyrðingi, er frískt lot alla tíðina.

Landnyrðing er ikki ein góð terraætt, sum hinar høgættirnar. Tað kann regna nokkso nógv, og tað er sjóvarfallið sum í ein stóran mun ger av, nær tað regnar. Tey sum turka hoyggja, mugu brúka turkilag – tað ber illa til at turka niðri í hógvi. Kemur regnið úr Skarðinum, regnar heimanfyri, meðan tað er turt innanfyri. Markið ímillum har tað regnar, og har tað er turt, sæst á vegnum sum gjørt við linjuál. Landnyrðingur er ikki ring kavaætt.

Landnyrðingur er ikki brimætt, men tað kann gott vera mjørki. Mjørkin kemur oman úr Skarðinum og kann hanga oman ímóti hálvari bygdini.

## Landnyrðingur eystan

Landnyrðingur eystan líkist ættini, hann er saman við. Er hann saman við landnyrðingi, líkist hann landnyrðingi – og er er hann saman við eystan, líkist hann eystan. Tað er ein góð ætt, stilli inn á fjørðinum bert ein lítil vindvág.

## Eystan

Eystan liggur beint inn á fjørðin og er ein sera góð ætt bæði í Oyndarfirði og á Hellunum.




Vindurin er javnur, tá ið hann er eystan. Vindferðin er væl minni enn kring landið. Vindur av eystri merkist ikki ella sæst á fjørðinum, fyrr enn vindferðin fer upp um 20 m/s.

Eystan roynist væl til regn. Ættin er ikki vát, tó at tað kann regna viðhvørt. Tey siga í Oyndarfirði, at eystan veksur ikki nakra á. Tað ger landsynningur heldur ikki.

Eystan kann leggja nógvan kava. Tey vóru altíð eitt sindur bangin í Oyndarfirði, tá ið tað fór at kava av eystri, og tey sóu ikki Kalsoynna. Tað kundi tað verða stórkavi. Fór ættin bert sindur norðurum, var ikki nógvur kavi í bygdini, men eitt sindur á Oyndarfjarðarvegnum.

Eystan er mjørkaætt í Oyndarfirði, men ikki brimætt.

## Landsynningur eystan

Landsynningur eystan líkist eysturættini. Sera góð ætt í Oyndarfirði

## Landsynningur

Landsynningur kemur undan Nestangan og kann vera sera tráur.




Tá ið ættin er landsynningur, er vindurin ójavnur innanfyri og niðri í bygdini. Er nógvur vindur, kann hann vera sera harður. Heimanfyri og har frammi (*ovast í bygdini*) er javnur og tráur og kaldur, tá ið hann fer niðan ígjøgjnum Áardalin. Vindferðin er tann sama sum fyri landið.

Í nógvum vindi er torført at rokna landsynningin út, hvar hann fer. Hann fer niðan eftir fjallasíðuni ímillum Knúk og Vaðhorn og kemur so rangur út á fjørðin aftur. Hann kann fara, har sum tú als ikki hevði væntað. Tað kann uppstanda vandastøða.

Ein brunnbátur kom eina ferð inn á fjørðin at taka laks. Ættin var landsynningur, og tað var heilt fitt av vindi. Báturin legði at aliringinum við bakborði ímóti ættini. Vanliga er ikki neyðugt at binda bátin, tá ið teir taka fisk á henda hátt, men tá ið tær fyrst hvirlurnar komu út á fjørðin úr Knúki – tær sóust væl í glaðunum – fór báturin útfrá, og neyðugt var at binda bátin við tjúkkum enda.

Landsynningur er ein sera køld ætt, tá ið kavi er í fjøllunum í Norðoyggjum. Er kavi á Kunoynni er kalt í Oyndarfirði, men serliga tá ið tað eisini er kavi á Kalsoynni.

Ein skadda (*ein grái*) kann liggja á fjørðinum, og úr honum kann vera nógvur vindur – skadduvindur – meðan tað er stilli innanfyri. Liggur skaddan á fjørðinum, meðan várróðurin er, er ikki farandi á Norðhavið við opnum báti.

Lotar hann av landsynningi, er góður terri í Oyndarfirði. Tað kann eisini regna nógv og leingi, men hóast tað veksur landnyrðingur onga á í Oyndarfirði. Øðrvísi er á suðuri og á útsynningi, tá kunnu áirnar gerast sera stórar.

Á landsynningi kann vera nógvur mjørki um summarið. Hann kemur við vestfallinum norðureftir. Kemur hann spakuliga við einum góðum loti undan Nestanga og hevur hug at leggja seg ímóti

Rustini, so fer hann spakuliga fram við landi og inn í Botnin. Lítla løtu seinni kemur hann til bygdina, og so er greytasvart. Hetta tekur ein tíma ella so. Er nógvur vindurin, er ikki nógvur mjørki. Mjørkin kann liggja leingi um summarið.

Landsynningur er ikki brimætt í Oyndarfirði.

## Landsynningur sunnan

Landsynningur sunnan líkist landsynningi. Ein sera góð terraætt.

## Sunnan

Tá ið hann er sunnan, kemur lotið av Hellunum yvir um fjørðin.




Sunnan er ein góð góðveðursætt í Oyndarfirði. Vindferðin er minni enn kring landið. Í lítlum vindi er ikki ein ond í bygdini. Er nógvur vindur, er nógvur og ójavnur vindur í Oyndarfirði og glaður úti á fjørðinum. Glaðuvindur. Í illveðri tann ringasta ættin innanfyri.

Sunnan er ikki ein vát ætt. Tað er vanliga turt. Hongur eitt brúgvalag við regni yvir oyggjunum, regnar eisini í Oyndarfirði.

Góð terraætt í Oyndarfirði, men ikki á Hellunum. Har kann vera mjørki í dagavís. Á norðurætt, tá ið hann kemur úr Skarðinum, er øvugt við mjørka og óterra í Oyndarfirði, meðan á Hellunum er turt og góður terri.

Vanliga er ikki mjørki á suðurættini. Hann liggur fyri tað mesta yvir Hellunum og kemur ikki heim til Oyndarfjarðar. Viðhvørt er nógvur mjørki til, og tá kann hann eisini vera bygdini í Oyndarfirði.

Sunnan er ikki brimætt. Tað er vanliga kyrt – tað fer ikki um fliðuna. Tá ið tað kemur til brim og útróðrarlíkindi, so hava oyndfirðingar hugt yvir á Kalsoynna, undir Húsahálss. Brimar tað har, er óslætt á Norðhavinum – brimar tað ikki har, er slætt á Norðhavinum.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er ein góð ætt, líkist suðurættini. Er nógvur vindur, kann tað gerast ófantaligt í bygdini.

## Útsynningur

Útsynningur kemur úr buginum undir smoltstøðini og er ein góð ætt í Oyndarfirði.




Er beinur útsynningur, liggur hann innan úr botninum. Lotið fer út eftir fjørðinum og kemur ikki til bygdina. Vindurin er lítil, eisini tá ið nógvur vindur er í illveðri ella í stormi. Fínasta veður. Eftir at havnin varð bygd og grótkastið gjørt, verður vindurin stýrdur út á fjørðin. Tey leggja ikki merki til vindin heima í bygdini ella innanfyri – undantikið tey innastu húsini í Garðamørk. Tað er bara úr mastrunum niðri í havnini, at vindurin hoyrist. Tey høvdu kunnað turkað fjarar á útsynningi, so stilt er tað.

Viðhvørt um summarið í góðum útsynningsveðri kann ein mjørkabakki standa um skorðarnar, sum eru oman fyri Heltina – kallaðar Bláskorðar. Tá er nógvur vindur niður úr mjørkabakkanum, og illveður við glaðuvindi er á fjørðinum. Vindurin er ójavnur, og eftir hvirlur og glaður er ein løta við lítlum vindi og góðum veðri. Tá ið mjørkabakkin upployst, verður stilt á fjørðinum.

Sum nevnt omanfyri, er útsynningur ein góð ætt, men lítil skal til at hann ikki er góður meir. Er hann bert eitt strik vestan fyri útsynning, kemur lotið úr Laksá, og tað hevur eitt heilt annað veður sær í

Oyndarfirði. Tá kann vera nógvur vindur, eisini tá ið tað ikki er nógvur vindur kring landið. Í bygdini eru tey bangnari fyri hesum enn øllum høgættunum. Í bygdini er nógvur og ójavnur vindur. Og úti á fjørðinum er hann ógvuliga ringur.

Í nógvum vindi av útsynningi og glaðustroki, kunnu viðhvørt koma 3 til 5 harðar hvirlur við glaðum á fjørðnum, áðrenn hann fer upp í vestan. Eftir hvirlurnar er logn, meðan hann gongur upp, og tá ið hann er komin upp í vestan, er aftur nógvur vindur.

Einaferð um aldaskiftið, meðan teir tóku laks á fjørðinum, var ættin útsynningur, og 5 harðar hvirlur komu. Aftaná varð stilli, meðan hann gekk upp í vestan. Hálvan tíma seinni var stormur av vestri. Bátar fóru inn í havnina at bíða, og meðan tað er stilli, tosaðu menn um at byrja aftur. Men so brast hann á vestaneftir, og einki varð gjørt meira við tøku av laksi tann dagin.

Ættin kann vera vát viðhvørt. Tað kann regna nógv og leingi, og áirnar kunnu veksa seg stórar. Men tað kann eisini vera turt og gott veður við góðum terra í nakrar dagar.

Tá ið fólk í Oyndarfirði sóu, at hann setti eitt æl í Hjarðardali ella uppi á Heltnini, hugdu tey alt fyri eitt niðan í Vatnsdal, um regn eisini var har uppi ella ikki. Var einki regn har, so er tað bert eitt æl, men sæst ælingur har uppi eisini, so verður samregn.

Er mjørki í Oyndarfirði á útsynningi, kemur hann oman úr Heltnini ella út Hjarðardali, men hann kann standa har uppi og ikki koma heim í bygdina. Tá kemur vindurin heim, men mjørkin stendur eftir.

Útsynningur er ikki brimætt í Oyndarfirði, men tað kann vera stór vindvág, tá ið tað rekur upp í ættina. Tá ið vestfallið er hálvrunnið, stoytir tað inn á Stongina og fer fram við landinum og so tvørtur um fjørðin. Tað rekur ikki heilt inn. Gamalt er, at tað rekur ikki innan fyri Heimastugjógv, sum er eitt sindur innan fyri Rinkusteinarnar.

Tá ið tað soleiðis rekur upp í ættina, er stór vindvág. Í nógvum vindi og /ella hørðum streymi eru aldubrot onkuntíð uppií. Við eystfallinum er tað øvugt. Tá ið tað er meiri enn hálvrunnið, stoytist tað inn ímóti innan fyri Nestanga og fer fram við landi ímóti Hellunum og so tvørtur um fjørðin. Nógvar afturundirgerðir eru á fjørðinum.

## Útsynningur vestan

Útsynningur vestan líkist vesturættini og í vindi, og hon er ein sera ring ætt á fjørðinum. Hann kemur omanav, tá ið tað er vindur, er ikki tespiligt at arbeiða úti á fjørðinum. Kastivindar. Í bygdini roynist ættin betri.

## Vestan

Vestan kemur oman av Knúki og er ein keðilig ætt í Oyndarfirði.




Vindurin er ójavnur, tá ið hann er vestan. Hetta er ein slítandi ætt við hvirlum. Í illveðri skaðaætt. Hon heldur ikki góð, tá ið lítil vindur er kring landið.

Er nakað av vindi, kunnu hvirlur koma omanav og út av Rinkusteinunum og út á fjørðin. Verður siglt fram við landi í slíkum veðri við smábáti, er best at vera so mikið útifrá, at pláss er til at leggja bátin uppí.

Hann kann hava regn við sær, men kann eisini hava góðan terra í sær. Í frískum loti tornar tað væl.

Vestan er hvørki mjørka ella brimætt í Oyndarfirði.

## Útnyrðingur vestan

Útnyrðingur vestan kemur reinur úr Skarðinum og vindurin samlast oman ígjøgum dalin – til veður líkist hann vesturættini.

Útnyrðingur norðan er brimætt í Oyndarfirði. Tað er bakslættur av Kalsoynni. 4 tímar eftir, at tað er byrjað undir Kalsoynni, er baksláttturin komið inn á fjørðin. Tá verður tað sera óslætt.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur kemur úr Skarðinum oman ígjøgnum Áardal. Úti á fjørðinum melur hann.




Beinur útnyrðingur er góð ætt, men er hann bert eitt lítið sindur vestanfyri, so er brim. Ættin roynist væl í góðum veðri. Er nakað av vindi – ella nógvur vindur – er nógvur og ójavnur vindur oman ígjøgnum bygdina. Skaðaætt.

Lotið kemur av havinum, og tí er útnyrðingurin altíð ráðligur. Ættin er ikki nøkur serlig terraætt og er ikki at líta á í hoyna. Er bert eitt lítið lot, kann tað lukkast, men er lotið frískt lot, tornar einki.

Ofta eru ælingur uppií, og ættin er tí ofta vát í Oyndarfirði. Ikki ring kavaætt, tó at eitt sindur legst.

Útnyrðingur er bæði brim- og mjørkaætt í Oyndarfirði.

## Útnyrðingur norðan

Veðrið á útnyrðingi norði líkist veðrinum, tá ið ættin er útnyrðingur. Tað kann brima viðhvørt, men tað tað ikki á norði.